Almanna- og mentamálaráðið

Dagfesting:	29. sept. 2025
Mál nr.:	25/04216/5
Málsviðgjørt:	HP
Ummælistíð:	25. aug. til 15. sept.
Eftirkannað:	22. sept. 2025

Uppskot til

Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um almannatrygd og tænastur (Almannalógin)
(Hækking av hægst møguliga endurgjaldi fyri mista arbeiðsinntøku)

§ 1

Í løgtingslóg nr. 72 frá 25. mai 2020 um almannatrygd og tænastur (Almannalógin), sum broytt við løgtingslóg nr. 168 frá 12. desember 2020, § 11 í løgtingslóg nr. 159 frá 10. desember 2021, løgtingslóg nr. 71 frá 5. mai 2022, § 6 í løgtingslóg nr. 32 frá 9. mars 2023, løgtingslóg nr. 154 frá 19. desember 2023 og løgtingslóg nr. 45 frá 27. mars 2025, verður í § 25, stk. 7, 1. pkt. "25.000 kr." broytt til: "31.000 kr.".

§ 2

Henda løgtingslóg kemur í gildi 1. januar 2026.

Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

1.1. Orsakir til uppskotið

Hægst møguliga endurgjald fyri mista arbeiðsinntøku sambært § 25 í løgtingslóg um almannatrygd og tænastur er 27.779 kr. um mánaðin, sum er lutfalsliga lágt samanborið við ein stóran part av sáttmálalønum á arbeiðsmarknaðinum. Avmarkingin hevur við sær, at nógvar familjur eru fyri inntøkumissi, tá neyðugt er at fara av arbeiðsmarknaðinum í sambandi við ansing av barni, ið ber brek, ansing av doyggjandi, ansing av persóni við seinheilaskaða, ella tá foreldur, ið missa eitt barn, fara av arbeiðsmarknaðinum fyri at syrgja.

Avmarkingin kann hava við sær, at tað eru fíggjarlig atlit, sum avgera, hvussu familjan leggur ansingina til rættis, tí úti við 90 prosent av teimum, sum fáa endurgjald fyri mista arbeiðsinntøku, eru kvinnur. Verandi skipan leggur upp til, at tað er tann við lægru inntøkuni, sum fer av arbeiðsmarknaðinum í sambandi við sosialar hendingar, ið eru fevndar av § 25 í løgtingslóg um almannatrygd og tænastur.

1.2. Galdandi lóggáva

Endurgjald fyri mista arbeiðsinntøku kann veitast í hesum førum:

1. tá tað vegna likamligt ella sálarligt brek ella varandi sjúku er neyðugt at ansa barni í heiminum, ella at vera hjá barni í ávíst tíðarskeið í sambandi við viðgerð,
2. tá persónur undir fólkapensjónsaldur, sum ynskir at doyggja heima, verður ansaður av persóni, sum ein hevur eitt serligt og tætt tilknýti til,
3. tá persónur undir fólkapensjónsaldur við seinheilaskaða, sum vegna vantandi pláss á bústaði sambært §§ 45 ella 46, verður ansaður í heiminum av persóni, sum ein hevur eitt serligt og tætt tilknýti til, ella
4. tá barn yngri enn 18 ár doyr ella er deyðføtt.

Í løgtingslógini er ásett, at endurgjald verður veitt fyri allan inntøkumissin, men ikki fyri tann partin av inntøkuni, ið er hægri enn 25.000 kr. um mánaðin, umframt frítíðarløn og bundna eftirlønargjaldið. Upphæddin á 25.000 kr. verður javnað sambært løgtingslóg um javningarprosent til almannaveitingar, og sostatt er upphæddin í 2025 komin upp á 27.779 kr. um mánaðin.

Upprunaliga varð endurgjald veitt fyri fullan lønarmiss, uttan hámark. Í 2009 varð ásett eitt hámark, sum tá varð sett til somu upphædd, sum var ásett í Barsilsskipanini, sum tá var 25.000 kr. um mánaðin. Tó var tað soleiðis, at frítíðarløn varð drigin frá hámarksupphæddini, so veruliga endurgjaldið var í mesta lagi umleið 22.300 kr. um mánaðin. Í 2020 varð frítíðarløn løgd aftrat endurgjaldinum, og veruliga hámarksupphæddin hækkaði sostatt til 25.000 kr. Hægst møguliga upphæddin varð fyrstu ferð javnað í 2022, og sum nevnt omanfyri er upphæddin nú 27.779 kr. um mánaðin.

Meginparturin av teimum, sum fáa endurgjald fyri mista arbeiðsinntøku, fáa endurgjald í sambandi við barn, ið ber brek ella hevur varandi sjúku (pkt. 1 omanfyri). Talan er bæði um persónar, sum fara av arbeiðsmarknaðinum fyri í staðin at uppihalda barni fulla tíð, eins og talan kann vera um persónar, sum fara niður í lægri starvsbrøk, ella fáa endurgjald fyri styttri tíðarskeið. Eisini persónar, sum fáa endurgjald fyri mista arbeiðsinntøku sambært pkt. 4 omanfyri, kunnu arbeiða lutvíst og fáa lutvíst endurgjald. Persónar, sum fáa endurgjald fyri

mista arbeiðsinntøku sambært pkt. 2 og 3 omanfyri, kunnu ikki hava arbeiðsinntøkur fyri sama tíðarskeið, sum endurgjald verður veitt fyri.

1.3. Endamálið við uppskotinum

Endamálið við uppskotinum er at hækka hámarkið fyri hægst møguliga endurgjald fyri mista arbeiðsinntøku upp til 31.000 kr. um mánaðin, umframt frítíðarløn og bundið eftirlønargjald sambært løgtingslóg um eftirlønir, og harvið bøta um fíggjarligu umstøðurnar hjá teimum, sum eru fyri inntøkumissi í sambandi við sosialar hendingar, sum eru ásettar í § 25, stk. 1 í løgtingslógini.

1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum

Við hesum uppskotinum verður hægst møguliga endurgjald fyri mista arbeiðsinntøku sambært § 25 í løgtingslóg um almannatrygd og tænastur hækkað til 31.000 kr. um mánaðin, umframt frítíðarløn og bundið eftirlønargjald sambært løgtingslóg um eftirlønir. Hægst møguliga endurgjald í 2025 er 27.779 kr. um mánaðin. Upphæddin hevði verið javnað í 2026, men við hesum uppskotinum verður upphæddin sum nevnt ásett til 31.000 kr. um mánaðin galdandi frá 1. januar 2026. Upphæddin verður fyrstu ferð javnað í 2027.

1.5. Ummæli og ummælisskjal

Uppskotið varð lagt alment til ummælis á ummælisportalinum hjá Føroya landsstýri tann 25. august 2025. Harumframt fingu hesi uppskotið til hoyringar:

Almannaverkið
Berin
Fakfelagssamstarvið
Fíggjarmálaráðið
Føroya Arbeiðsgevarafelag
Kommunufelagið
Kommunala arbeiðsgevarafelagið
Krabbameinsfelagið
MEGD
Ráðgevingin fyri føroyingar í Danmark
Samtak
Samverk
Sjúklingaráðið
Sosialráðgevarafelag Føroya

Almannaverkið, Føroya Arbeiðsgevarafelag, Heilsuhjálparafelag Føroya, Ráðgevingin fyri føroyingar í Danmark og Sjúklingaráðið hava sent Almanna- og mentamálaráðnum ummælisskriv, har tey boða frá, at tey ikki hava viðmerkingar til lógaruppskotið.

Javni fegnast um uppskotið og tekur undir við broytingini. Javni nýtir tó eisini høvið at gera vart við onnur viðurskifti, ið kunnu betrast hjá teimum, sum mugu vera heima hjá barni, ið ber brek. Javni vísir m.a. á, at uppskotið ikki bøtir um støðuna hjá teimum, sum hava lága inntøku, ella hjá teimum, sum eru nýútbúgvin og ikki hava fingið fótafesti á arbeiðsmarknaðinum.

Almanna- og mentamálaráðið skal gera vart við, at hetta lógaruppskotið hevur til endamáls at hækka hægst møguliga endurgjaldið. Og sostatt eru tað einans tey, sum hava inntøku hægri enn hámarksveitingina, sum eru fevnd av hesum lógaruppskoti, og sum fáa ágóða av broytingini.

Eisini ger **Javni** vart við onnur viðurskifti, sum eru ásett í kunngerð um endurgjald fyri mista arbeiðsinntøku. **Almanna- og mentamálaráðið** skal vísa á, at viðmerkingarnar ikki eru viðkomandi fyri hetta lógaruppskotið.

Føroya Lærarafelag tekur undir við uppskotinum um at hækka endurgjaldið fyri mista arbeiðsinntøku til 31.000 kr. Felagið saknar tó grundgevingar fyri, at mesta útgjald er ásett til júst 31.000 kr., sum annars er 80 kr. lægri enn hámarkið fyri barsilspening. **Almanna- og mentamálaráðið** skal gera vart við, at upphæddin í hesum lógaruppskotinum er politiskt ásett. Útgjaldið úr Barsilsskipanini, sum Føroya Lærarafelag sipar til, er upphædd galdandi í 2025, meðan upphæddin sambært hesum lógaruppskotinum verður galdandi frá 1. januar 2026. Hámarkið fyri barsilspening verður javnað sambært løgtingslóg um javningarprosent til almannaveitingar, og tí hækkar hámarkið fyri barsilspening sannlíkt við nøkrum 100 kr. í 2026.

Føroya Lærarafelag vísir á, at tað manglar útrokning fyri, hvørjar avleiðingar uppskotið kann fáa á barnagarðsgjaldið, tí tað hækkar samstundis, sum gjaldið fyri mista arbeiðsinntøku hækkar. **Almanna- og mentamálaráðið** hevur ikki lýst, hvørjar avleiðingar lógaruppskotið hevur fyri egingjøld fyri dagstovn. Tá ein almannaveiting verður hækkað við eini løgtingslógarbroyting, ella inntøkan broytist orsakað av lønarhækkingum ella aðrari orsøk, kann tað ávirka egingjøld til dagstovn, tað kann ávirka rættin til familjuískoyti, og tað kann t.d. ávirka marginalskattaprosentið hjá tí einstaka, tí skattskylduga inntøkan fer upp um eitt ávíst mark. Almanna- og mentamálaráðið hevur ikki siðvenju at lýsa hesi avleiddu viðurskifti í sambandi við broytingar á almannaveitingum. Ein avleidd avleiðing av hækkaðum hámarki fyri endurgjald fyri mista arbeiðsinntøku kann vera, at egingjald til dagstovn hjá teimum, sum fáa lutvíst fíggjarligt fríplass, verður eitt sindur hægri. Hetta er eisini galdandi fyri øll onnur, sum fáa eina hægri inntøku.

Føroya Lærarafelag mælir til at strika hámarkið fyri endurgjald fyri mista arbeiðsinntøku, og at skipanin verður broytt soleiðis, at foreldur fáa endurgoldið mista arbeiðsinntøku, sum tey sambært lønarsáttmála hava rætt til. **Almanna- og mentamálaráðið** skal vísa á, at tað ikki er møguligt innanfyri fíggjarligu karmarnar at hækka hámarkið fyri endurgjald fyri mista arbeiðsinntøku meira enn tað, sum er ásett í hesum lógaruppskoti.

Almanna- og mentamálaráðið metir samanumtikið, at viðmerkingarnar frá Javna og frá Føroya Lærarafelag ikki eru orsøk til at broyta lógaruppskotið.

Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Tað eru umleið 90-100 fólk, sum hvønn mánað fáa endurgjald fyri mista arbeiðsinntøku sambært § 25 í løgtingslóg um almannatrygd og tænastur. Ein partur av hesum hava arbeiðsinntøkur lægri enn hámarksupphæddina og fáa tí ikki ágóða av eini hækking.

Ein hækking til 31.000 kr. merkir eina hækking uppá umleið 3.200 kr. um mánaðin, samanborið við upphæddina í 2025. Fyri landskassan merkir broytingin, at útreiðslurnar til endurgjald fyri mista arbeiðsinntøku hækka leysliga mett við 1-2 mió. kr. um árið. Hámarksupphæddin verður javnað sambært løgtingslóg um javningarprosent til almannaveitingar. Javnaða upphæddin verður lýst í kunngerð í seinasta lagi 1. desember, men av tí at upphæddin verður ásett av nýggjum, galdandi frá 1. januar 2026, fellur javningin burtur, og sostatt verða útreiðslurnar til javning umleið 500-700 tús. kr. lægri í 2026.

2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Uppskotið snýr seg einans um at broyta eina upphædd, og uppskotið hevur sostatt ikki við sær umsitingarligar avleiðingar.

2.3. Avleiðingar fyri vinnuna
Uppskotið hevur ikki við sær fíggjarligar ella umsitingarligar avleiðingar fyri vinnuna.

2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið
Uppskotið hevur ikki við sær avleiðingar fyri umhvørvið.

2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum
Uppskotið hevur ikki við sær avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.

2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir
Uppskotið hevur við sær jaligar avleiðingar fyri tey, sum fáa endurgjald fyri mista arbeiðsinntøku sambært § 25 í løgtingslóg um almannatrygd og tænastur, og sum hava inntøkugrundarlag hægri 27.779 kr.

2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum
Uppskotið hevur ikki við sær avleiðingar fyri millumtjóðasáttmálar á økinum.

2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar

1) **Hoyvíkssáttmálin**
   Uppskotið er ikki í ósamsvari við Hoyvíkssáttmálan.

2) **Evropeiski mannarættindasáttmáli, EMRS**
Uppskotið er ikki í ósamsvari við Evropeiska mannarættindasáttmálan.

3) **Sáttmáli Sameindu Tjóða um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek**
Uppskotið verður ikki mett at hava avleiðingar fyri Sáttmála Sameindu Tjóða um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek.

2.9. Markaforðingar
Uppskotið hevur ikki við sær markaforðingar.

2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv
Uppskotið hevur ongar ásetingar um revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur inntriv.

2.11. Skattir og avgjøld
Lógaruppskotið hevur ikki ásetingar um skattir ella avgjøld.

2.12. Gjøld
Lógaruppskotið hevur ikki ásetingar um gjøld.

2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?
Lógaruppskotið leggur ikki likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur.

2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrismannin, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?
Lógaruppskotið leggur ikki heimildir til landsstýrisfólkið, stovn undir landsstýrinum ella til kommunur.

2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?
Lógaruppskotið gevur ikki almennum myndugleikum atgongd til privata ogn.

2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?
Lógaruppskotið hevur ikki aðrar kendar avleiðingar enn tær, sum eru nevndar omanfyri.

2.17. Talvan: Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum

	Fyri landið ella landsmyndug-leikar	Fyri kommunalar myndugleikar	Fyri pláss ella øki í landinum	Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir	Fyri vinnuna
Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar	Ja	Nei	Nei	Ja	Nei

Umsitingarligar avleiðingar	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Umhvørvisligar avleiðingar	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Sosialar avleiðingar			Nei	Nei	

Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

3.1. Viðmerkingar til ta einstøku greinina

Til § 1
Við uppskotinum verður hægst møguliga endurgjald fyri mista arbeiðsinntøku ásett til 31.000 kr. um mánaðin, umframt frítíðarløn og bundið eftirlønargjald sambært løgtingslóg um eftirlønir.

Uppskotið hevur ikki annað endamál enn at hækka hægst møguliga endurgjaldið, og sostatt verður onki annað broytt í skipanini, samanborið við higartil galdandi skipan.

Til § 2
Løgtingslógin kemur í gildi 1. januar 2026. Tað merkir, at hægst møguliga endurgjald í 2026 verður 31.000 kr. um mánaðin. Upphæddin verður fyrstu ferð javnað sambært løgtingslóg um javningarprosent til almannaveitingar í 2027.

Almanna- og mentamálaráðið, 29. september 2025

Eirikur í Jákupsstovu
landsstýrismaður

/ Eyðun Mohr Hansen

Yvirlit yvir fylgiskjøl:
Fylgiskjal 1: Javntekstur
Fylgiskjal 2: Javni
Fylgiskjal 3: Føroya Lærarafelag
Fylgiskjal 4: Almannaverkið
Fylgiskjal 5: Ráðgevingin fyri føroyingar í Danmark
Fylgiskjal 6: Sjúklingaráðið
Fylgiskjal 7: Heilsuhjálparafelag Føroya
Fylgiskjal 8: Føroya Arbeiðsgevarafelag